# Greiður meiriluti fyri samanlegging

Vegleiðandi fólkaatkvøða var leygardagin í Leirvík og Gøtu um kommunusamlegging. Í Gøtu vóru 85 prosent av teimum, sum atkvøddu, fyri samanlegging. Í Leirvík atkvøddu 61 prosent fyri samanleggingini.

Í Gøtu vóru 467 fólk á vali, hetta er 63 prosent av teimum, sum hava valrætt. 396 av teimum vóru fyri samanlegging, 70 vóru ímóti, og ein atkvøða var blonk.

Í Leirvík atkvøddu 488 fólk, sum eru 76 prosent av teimum, ið hava valrætt. Har vóru 296 fyri samanlegging, og 189 vóru ímóti.

– Hetta er ein greiður meiriluti, og vit skilja tað sum, at fólkið ynskir samanleggingina, sigur Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík.

– Vit hava frammanundan sagt, at vit fara at gera sum meirilutin ynskir.

Væntandi leggja kommunurnar saman, tá komandi bygdarráð tekur við 1. januar 2009.

**- ella**




Borgarstjórin í Leirvík:

## – Týdningarmikið at fáa atkvøðuna avgreidda




*– Fyri okkum er tað natúrligt, at Leirvík og Gøta leggja saman, tí at bygdirnar liggja so tætt, og tað eru stórir møguleikar við einum samstarvi, sigur Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**– Tað var týdningarmikið at fáa fólkaatkvøðuna avgreidda sum skjótast, so at vit beinanvegin kunnu byrja at arbeiða fram móti einari samanlegging, sigur Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík. Hon heldur, at meirilutin var greiður, og vísir aftur pástandunum um, at fólkaatkvøðan kom ov brádliga á**

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

åFríðgerð Heinesen er borgarstjóri í Leirvík. Hon er væl nøgd við úrslitið av fólkaatkvøðuni í bygdunum báðum. Hon heldur ikki at 61 prosent fyri samanlegging er ov lítið.

– Hatta er ein greiður meiriluti. Næsta stig hjá okkum verður at kalla inn til fund bygdaráðini hvør sær. Eftir ætlan fara bygdaráðini so at staðfesta samanleggingina, og síðani skal landsstýrismaðurin góðkenna samanleggingina, sigur Fríðgerð.

### Gøta er rætta loysnin

Summi hava klagað um, at freistin hevur verið ov stutt til atkvøðuna, og at samanleggingin er komin ov brádliga á. Onkrar røddir hava eisini nevnt møguleikanum, at Leirvík og Klaksvík kunnu leggja saman, men tann møguleikin varð als ikki troyttur.

– Fyri bygdaráðini var tað týdningarmikið at fáa fólkaatkvøðuna avgreidda sum skjótast, so at vit beinanvegin kunnu byrja at arbeiða fram móti einari samanlegging. Fyri okkum er tað natúrligt, at Leirvík og Gøta leggja saman, tí at bygdirnar liggja so tætt, og tað eru stórir møguleikar við einum samstarvi, sigur borgarstjórin í Leirvík, sum í næstum fer at hava úr at gera við fundum og at leggja ætlanir.

Gøta og Leirvík:

## Samanleggingin verður staðfest í nærmastu framtíð

**Hans Mourits Foldbo, borgarstjóri í Gøtu Kommunu, er væl nøgdur við úrslitið av fólkaatkvøðuni í Leirvík og Gøtu, sum varð avgreidd leygardagin. – Vit fara í nærmastu framtíð at staðfesta, at samanleggingin fer í gildi 1. januar 2009, sigur borgarstjórin, sum ætlar sær at arbeiða meira miðvíst móti samanleggingini, nú fólkið hevur sagt sína hugsan**



*Vit ætla ikki, at kommununar báðar skulu trekkja seg for og gera stórar íløgur, áðrenn samanleggingin verður veruleiki, eins og vit hava sæð dømi um á Skálafjørðinum, tá ið kommununar vórðu lagdar saman*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Nýsetti borgarstjórin í Gøtu, Hans Mourits Foldbo, er væl nøgdur við úrslitið av fólkaatkvøðuni um samanleggin millum Leirvíkar og Gøtu Kommunu. Í samrøðu við Sosialin fyri góðum mánað síðani, gjørdi Hans Mourits tað greitt, at hann sær nógvar fyrimunir við einari samanlegging. Eisini gjørdi hann seg til forsprákara fyri, at allur sunnari parturin av Eysturoynni gerst ein kommunu í framtíðini.

Fólkaatkvøðan vegleiðandi - úrslitið bindandi

Hans Mourits vísir á, at bygdaráðini kunnu arbeiða miðvíst fram móti samanlegginingi, nú úrslitið er greitt.

– Eg eri væl nøgdur við úrslitið. Talan var um eina vegleiðandi atkvøðu, men tá ið úrslitið er so greitt, kann hon einans metast sum bindandi fyri bygdaráðini. Eg vænti, at vit fara at staðfesta samanleggingina í januar 2009 í nærmastu framtíð, sigur Hans Mourits.

Eftir ætlan er næsti fundur hjá bygdaráðnum í Gøtu tann 25. september.

– Eg veit ikki, um vit taka ein eykafund, ella um vit bíða í tvær vikur og hava fundin sum ætlað. Eg fari at tosa við Fríðgerð Heinesen (Borgarstjóri í Leirvík. Blaðm.) seinni í dag, og so fara vit at taka støðu til tað, sigur hann.

### Einki oyðsl av pengum

Nú úrslitið er greitt, fara bygdaráðini at arbeiða meira miðvíst móti ætlaðu samanleggingini í 2009.

– Sáttmálin um samanleggingina er grundarlag fyri, hvussu vit skulu bera okkum at. Vit fara sum sagt at tosa saman, og so kunnu vit longu nú byrja at samstarva, so at vit sleppa undan dupultíløgum og tílíkum. Vit ætla ikki, at kommununar báðar skulu trekkja seg for og gera stórar íløgur, áðrenn samanleggingin verður veruleiki, eins og vit hava sæð dømi um á Skálafjørðinum, tá ið kommununar vórðu lagdar saman. Vit fara at gera nakrar góðar langtíðar íløgur, men alt verður gjørt við skili.

Um alt gongst eftir ætlan, kemur ein staðfesting í nærmastu framtíð frá bygdaráðunum í Leirvík og Gøtu um, at samanleggingin verður ein veruleiki, og at tey fara at arbeiða fram móti henni.